## Exxon knívin á barkan

Myndugleikarnir í Venesuela hava givið heimsins størsta oljufelag, tí amerikanska Exxon Mobil, eini greið boð: Vil felagið ikki skriva undir eina samstarvsavtalu við myndugleikarnar innan árslok, missir felagið øll síni rættindi á venesuelskum øki.

Stjórnin hjá Hugo Chavez, forseta hevur fingið tilsvarandi avtalu í lag við hini útlendsku oljufeløgini, sum arbeiða í landinum. Feløg sum Chevron, BP, Shell og Total hava skrivað undir. Avtalan ber í sær, at myndugleikarnir fáa størri ræði á oljuvinnuni, og at oljufeløgini skulu gjalda væl meiri skatt, enn tey higartil hava gjørt. Stjórnin hevur leingi sagt, at eftir hennara tykki hava feløgini goldið ov lítlan skatt higartil. Tær nýggju inntøkurnar ætlar stjórnin at brúka til at hjálpa teimum ringast støddu í landinum, skrivar AP.

Einasta oljufelagið, sum hevur sýtt fyri at ganga undir nýggju treytirnar hjá stjórnini, er Exxon Mobil. Slakar felagið ikki, kann tað hava við sær, at felagið verður blakað út úr Venesuela.

## Aftur ein á dálkað

Fyri aðru ferð í ein mánað er ein á í Kina so illa dálkað, at vandi er fyri, at drekkivatnið verður eitrað.

Hesaferð er talan um Shaoguan-ánna í landspartinum Guangdong. Myndugleikarnir siga, at ein leki á einari sinkverksmiðju hevur gjørt, at nógv kadmium er runnið út í ánna. Í gjár var tað dálkaða vatnið komið so nær einum býi, at myndugleikarnir har gjørdu av at sløkkja vatnveitingina. Samstundis fingu fólk, ið búgva fram við ánni, forboð fyri at brúka vatn úr ánni, og myndugleikarnir sendu tangabilar við drekkivatni.

Fyri fýra vikum síðani var ein á har norðuri í Kina illa dálkað av einari spreinging á einari verksmiðju. Dálkingin rakti millum drekkivatnið í býnum Harbin, har umleið níggju milliónir fólk búgva. Dálkingin gjørdi eisini um seg í Russlandi, av tí at áin rennur inn um russiska markið.

## Alt útlendskt av tí illa

Sjálvt um tað hevur verið bannað at spæla vesturlendskan tónleik í Iran síðani kollveltingina í 1979, hava myndugleikarnir ikki lagt so stóran dent á forboðið, og tí hava iranar vant seg við bæði klassiskan og nútímans tónleik úir Vesturheiminum. Men nú er øðrvísi, tí tann nývaldi forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, bannar nú iranum at spæla ella at lurta efti vesturlendskum tónleiki.

Men tað er ikki bara tónleikurin, sum stendur fyri skotum. Í august avdúkaði ein frágreiðing, at iranar drekka verri, enn myndugleikarnir høvdu gjørt sær far um, og at brennivínið kemur úr Evropa. Vesturlendskt øl hevur eisini funnið leið inn um iranska markið, og sambært frágreiðingini var tað eingin trupulleiki hjá iranum at keypa sær ein kassa av Heineken ella Tuborg.

Men eisini her skal annað skil koma á, sigur forsetin, sum hevur kunngjørt, at tann, sum bryggjar ella selir alkohol-drykkir, kann fáa fongsul ímillum seks mánaðir og tvey ár. Harafturat kann viðkomandi fáa 74 koyrlasløg, stóra bót, forboð fyri at fara av landinum og forboð fyri at koyra bil. Er hendan revsingin ikki nóg mikið, er forsetin til reiðar at biðja tjóðartingið herða hana, skrivar AP.

## Kvinnur mugu ikki sita aftanfyri

Skalt tú leiga ein hýruvogn í teimum stóru býunum í tí muslimska partinum av Nigeria, er tað ikki vist, at tú finnur nakran. Harafturímóti kann tað væl henda, at tú kanst fáa fatur á einari motorsúkklu, sum koyrir hýrukoyring.

Men ert tú kvinna, noyðist tú fyrst at kanna, um tað er ein maður ella ein kvinna, sum situr frammanfyri, tí tann muslimski guvernørurin hevur bannað kvinnum at sita aftanfyri á motorsúkklum, um persónurin frammanfyri er ein maður. Guvernørurin sigur, at sambært teirri halgu Koranini er tað óverdugt fyri eina kvinnu at sita og gleiva aftan fyri ein mann, samstundis sum hon ofta noyðist at halda um føraran frammanfyri.

Ibrahim Shekarau, guvernørur, sigur sambært tíðindastovuni AP, at hann er ikki sinnaður at ganga ímóti Koranini, og at hann tí umhugsar at finna eina loysn fyri kvinnurnar.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Hjálptu hvalunum útaftur



*Alt varð gjørt fyri at bjarga teimum strandaðu hvalunum*
*Mynd: Reuteres*

**Umleið 100 hvalir gjørdu landgongd á einari strond í Ný Sælandi, men tað eydnaðist hjálparfólki at fáa teir útaftur.**

LANDGONGD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjár vóru grindaboð á Puponga-strondini á teirri syðru meginoynni í Ný Sælandi, og maður fór av húsi - ikki at drepa grind, men at hjálpa umleið 115 hvalum, sum høvdu gjørt landgongd.

Tað vísti seg, at 115 grindahvalir vóru komnir inn á flóðini, og at teir gloymdu at fara útaftur, áðrenn tað fjaraði. Úrslitið var, at hvalirnir vórðu liggjandi inni á sandinum. Hjálparfólk og ferðafólk í stórum tali royndu at halda lív í hvalunum, til tað fløddi aftur. Fólk stoyttu sjógv á hvalirnar og løgdu vát løk oman á teir, og á tann hátt eydnaðist tað at bjarga umleið 100 av teimum 115 hvalunum út aftur á lívi, skrivar Reuter.

# Blair um at missa takið

**Misnøgd við ES-politikkin og innanhýsis ósemja í arbeiðaraflokkinum á skúlaøkinum hava givið teimum konservativu í Bretlandi vind í seglini**



*Tony Blair hevði tapt, var parlamentsval í Bretlandi nú*
*Mynd: Reuters*

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fyrstu ferð í fimm ár og aðru ferð í trettan ár fær tann konservativi andstøðuflokkurin í Bretlandi størri undirtøku ímillum veljararnar enn arbeiðaraflokkurin. Sambært einari kanning hjá The Guardian høvdu teir konservativu fingið 37 prosent av atkvøðunum, var val nú, meðan arbeiðaraflokkurin hevði endað eitt prosent niðanfyri.

Við tí einans 39 ára gamla nýggja formanninum David Cameron hava teir konservativu endiliga fingið ein formann, sum veljararnir hava álit á, og sum teir eisini síggja sum ein komandi stjórnarleiðara. Samstundis eru fólk misnøgd við Blair, og meiri enn helmingurin av teimum spurdu siga, at hann er ikki nóg góður. Hjá Blair er tað uppaftur verri at hoyra og lesa, at tveir triðingar av veljarunum tykjast hava ta sannføring, at tann ungi Cameron hevði verið tann rætti, og teirri støðuni ger Cameron sær sjálvandi dælt av.

- Hvussu ber tað til, at tú letur teir fáa tað, teir vilja hava, uttan at vit fáa nakað afturfyri, spurdi hann Blair, tá parlamentið fyrr í vikuni viðgjørdi figgjarlógina hjá ES. Við hesum sipaði hann til, at tað miseydnaðist Bretlandi at krevja landbúnaðarpolitikkin hjá ES umskipaðan, aftur fyri at landið sleppur úr einum parti av sínum avslátti.

Men tað er ikki bara misnøgd við ES-politikkin, sum kostar Blair undirtøku í hesum døgum. Stjórnin hevur boðað frá, at hon fer at leggja eina nýggja ætlan um skúlaverkið fram í februar, men vinstravongurin í arbeiðaraflokkinum stúrir fyri, at ætlanin fær óhepnar avleiðingar. Eitt nú hava 70 tinglimir hjá Labour skrivað undir eitt mótmæli, sum vísir á, at nýggja ætlanin fer at hava við sær, at stórur munur verður á skúlunum.

Reuter skrivar úr London, at hetta kann noyða Blair at biðja teir konservativu um stuðul fyri at fáa skúlamálið ígjøgnum parlamentið. Stuðulin fær hann helst, men tað fer ikki at styrkja støðu hansara, hvørki innan-ella uttanfloks.